TEAM85 | © Image provided by: Dreamstime.com

KT-felagið skipar á triðja sinni fyri KT-stevnu

# KT2006

## 20.-21. apríl í Norðurlandahúsinum

KT2006 er skipað í tveimum pørtum. Ein partur er framsýningin, har fyritøkurnar vísa tað, tær hvat tær eru allarbest til. Hin parturin er ein ráðstevnupartur, har málið er at menna førleikarnar og geva føroyska vinnulívinum íblástur.

KT2006 gevur tær sum KT-innkeypara ein MEGA góðan møguleika at fáa kunnleika til og innlit í føroysku KT-vinnuna, sum er før fyri at nøkta KT-tørvin í Føroyum. Kom og finn útav, hvønn tú kanst fáa eitt gott samstarv við í sambandi við komandi íløgur í KT-loysnir.

Málbólkurin til KT2006 eru stjórar, leiðarar, KT-innkeyparar og starvsfólk í fyritøkum. Við røttu skipanunum, kanst tú spara nógva tíð -og onkur segði at tíð er peningur! Umframt hetta, vendir stevnan sær eisini til fólk, ið onkusvegna hava áhuga í KT og KT-skipanum. At enda vendir KT2006 sær til ein breiðan hóp, sum hevur áhuga í at hoyra onkran av spennandi fyrilestrunum á stevnuni.

### FRAMSÝNARAR Á STEVNUNI:

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **KT-Kleking** | *www.trade.fo* | **FO-ráðið** | *www.nic.fo* | **Kall** | *www.kall.fo* | **Reproz** | *www.reproz.fo* |
| **iConcept** | *www.iconcept.fo* | **ISUUS MOBILE** | *www.isuus.com* | **Farodane** | *www.farodane.fo* | **Bitland** | *www.bitland.fo* |
| **Com-Data** | *www.com-data.fo* | **Føroya Tele** | *www.tele.fo* | **Zenit** | *www.zenit.fo* | **LM Electric** | *www.lm.fo* |
| **Sansir** | *www.sansir.fo* | **Formula** | *www.formula.fo* | **Elektron** | *www.elektron.fo* | | |



### KREATIV LEIÐSLA
v/ Peter Langdal Jensen

Jú stuttligari tað er at koma til arbeiðis, jú meiri produktivitetur, innovatión og rentabilitetur og harafturat betri arbeiðsklima. Ert tú stjóri, leiðari ella hevur ábyrgd fyri starvsfólki, er hesin fyrilestur eitt MUST!

Peter Langdal Jensen, helst mest succesfulli teaterinstruktørurin í Danmark, og sera væl dámdur fyrilestrahaldari, ið hevur vunnið eina ørgrynnu av prísum, verður at hoyra LIVE á KT-stevnuni.



### ARBEIÐIR TÚ, FYRI AT TEKKJAST ØÐRUM?
v/Tor Nørretranders

Vit hava verið so heppin, at hava fingið kenda danska rithøvundin og fyrilestrarhaldaran Tor Nørretranders til KT2006. Tor er kendur fyri at kunna greiða frá fløktum vísindaligum teorium, á ein hátt soleiðis at vit øll skilja tað. Ein fyrilestur fyri øll. Fyrilesturin handlar um at verða menniskja og hvat "driver værket". Tor er rithøvundur og millum kendastu bøkur hansara eru: Det generøse menneske (kom út á 7 málum). Fyrilesturin hjá Tor byggir á hesa bókina.



### GLOYM HEIMAMARKNAÐIN!
v/ Heina Zachariassen

Á KT2006 fært tú møguleikan at hoyra Heina geva sítt boð uppá, hvussu hann heldur, at KT-vinnan í Føroyum kann koma út í heim. Hann fer eisini at greiða frá, hvussu hann saman við øðrum hevur ment fyritøkuna BullGuard. Hevur tú spælt tær við tankan um, at fara út í heim við tínari fyritøku, tað verið seg innan KT ella aðrar vinnur, so kom og fá íblástur frá Heina á KT2006.



### DIGITALA HEIMIÐ
*– tað ultimativa elektroniska arbeiðsplássi*
v/ Birger Hauge, Dansk Bredbånd

Birger Hauge, Tekniskur stjóri í Dansk Bredbånd, hevur um nakar staðið á odda fyri menningini av danska breiðbandinum. Fyrilesturin vísir uppá ein visioneran hátt á møguleikarnar hjá fyritøkum, sum selja ella menna vørur til "Digitala heimið". Hvat kann seljast og hvør er keyparin? Hvussu skjótt gerast analogu vørurnar digitalar? Hvussu sær digitali forbrúkarin út. Kom og fá eitt boð uppá hetta á KT2006.

Ársins @ og Besti básur

Verða vald á KT2006!

### SERLIGT UNGDÓMSTILTAK FYRI MIÐNÁMSSKÚLANÆMINGUM!

Ungdómstiltakið er opið fyri øllum miðnámsskúlanæmingum eftir avtalu við skúlan og KT2006.

Skúlar kunnu venda sær til Synergi - synergi@synergi.fo - við upplýsingum um, hvussu nógvir næmingar koma frá hvørjum skúla. Avmarkað pláss!



### EIN KT-FRØÐINGUR ER IKKI EIN GANDAKALLUR!
v/ Silviu Lauritsen, KompeTansa

Hvussu síggja fólk KT-frøðina í dag, og hvussu fer okkara nýggja ættarlið at síggja hesa frøði? Kom og hoyr Silviu greiða frá hesum. Silvia gjørdist cand. IT í softwarekonstruktión við Aalborg Universitet í ár. Hon fekk óhoyrda miðaltalið 12,6!



### FRÁ LOKNUM MIÐNÁMSSKÚLA TIL STJÓRA Í BULLGUARD
v/ Heina Zachariassen

Sæð í bakspeglinum, hvussu bleiv Heini egentliga stjóri í BullGuard? Kunnu øll gera tað, sum hann hevur gjørt? Hvat krevst? Er tað tað vert? Kom og hoyr Heina siga sína søgu og set honum spurningar.

### MEGA TILBOÐ!

KT2006 vendir sær eisini til tín, ið hevur stórstan áhuga í spennandi fyrilestrunum.
Betri tilboð fært tú ikki: Spennandi fyrilestrar og framsýning fyri einans kr. 445,-/dagin

ATLANTIC AIRWAYS
- stuðul á KT2006

KT2006

Tilmelding og meira um tiltakið á www.kt.fo

Synergi samskipar KT2006 fyri KT-felagið
tel 22 RING (22 74 64) · synergi@synergi.fo